Veðrið

Fimmdagaforsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og eitt skifti regn. Hitin kemur upp í 5 stig.



Veðrið leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul av útsynningi og okkurt ælið, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind millum útsynning og útnyrðing og ælingur, partvís vátaslettingur ella heglingur. Hitin millum 2 og 5 stig.

Skipað verður fyri tiltøkum i Klaksvík til at heiðra tónaskaldið Johann Sebastian Bach. Mynd: Dávur Winther

Hátíðarhalda Bach

Tað eru í ár 250 ár síðan Johann Sebastian Bach doyði. Í hesum sambandi verður skipað fyri minningarhaldum, konsertum og fyrilestrum víða um heim til at hátíðarhalda henda merkismann, sum hevur fingið serheitið hin 5. evangelisturin.

Tað er ikki um at tala tað rúgvusmikla tónleikaverk, Bach legði úr hondum, sum ber boð um djúptøkna tónleikafatan, setta saman við andligari veking og teologiskum kunnleika. Tað sigst, at teologar í samtíðini misuntu Bach hansara rúgvusmikla teologiska lestnað.

Klaksvíkskórið hevur sett sær fyri at gera nakað burtúr Bach-árinum og ætlar tí at fyriskipa tveimum konsertum - eina nú til várs og eina til heystar. Konsertirnar skulu á ymiskan hátt lýsa Bach´sa tónleikaheim við kórverkum, soloum, strúkikvartettum og ikki minst við orgulverkum.

Til hetta verða boðnir solistar: Daisy Johannesen, sang; Michle Austin, orgul. Umframt møguliga onkur annar solistur innan sang og strúkarar eisini.

Eisini er ætlanin at skipa fyri trimum fyrilestrarkvøldum í kirkjukjallaranum tíðliga í heyst. Meinhard Bjartalíð, sum er útbúgvin organistur og teologur heldur fyrilestrarnar og skulu teir lýsa samtíðina hjá Bach tónleikaliga og átrúnaðarliga, eins og lýsa ævisøga hansara.

Eisini verða tónleikaverk hansara lýst og granska í nótauppbygningi á blaði og á fløgu, samstundis sum Meinhard Bjartalíð gevur nøkur tónleikadømi á urguni í kirkjuni. Eitt skeiðhefti verður gjørt til fyrilestrarnar.



Djúpa lágtrýstið við Ísland fer í landnyrðing.



Ein lítil hátrýstryggur yvir Íslandi verður yvir Føroyum í morgum, men lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing og hevur eitt sindur lýggjari veður við sær.



Hitalagið mált frá 23./02. kl 06⁰⁰–24./02. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,5°C
Minsti hiti máldur í februar: **÷11,0°** Mesti hiti máldur í februar: **11,0°**



Avfallið: 8,6 mm – **mált frá 23./02. kl 6⁰⁰–24./02. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í februar: 130,9 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷15
Nuuk	÷11
Qaqortoq	÷11
Ammassalik	÷5
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	1
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	5
Lerwick	6
Aberdeen	6
London	10
Tromsø	÷6
Bergen	3
Oslo	–
Stokkhólm	0
Keypmannahavn	2
Helsinki	÷12
Moskva	÷10
Berlin	2
Warzawa	0
Kiev	÷6
Bukarest	0
Paris	8
Madrid	14
Róm	11
Malorca	14
Athen	9
Malta	13
Tunis	10
Beijing	4
New Dehli	19
Bangkok	33
Jakarta	26
Sydney	–
New York	11
Miami	22
Los Angeles	11
Meksikobýur	20
Panama	31
La Paz	11
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	32

TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG

12. MAÐUR
Tlf. 213212

Vestfalskyrrindi

17. februar: Mánin næstur jørðini
19. februar: Fullmáni
27. februar: Seinna kvarter
28. februar: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Skipalistin 2000

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp	sp	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp	sp	Hestfirði/Sundalagnum fp	sp	Vestmannasundi fp	sp	Mykinesfirði fp	sp	Nólsoyarfirði fp	sp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp	sp	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp	sp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp	sp	Hvannasundi fp	sp	Fugloyarfirði fp	sp
25. feb.	10:01	22:22	9:01	21:22	9:16	21:37	—	12:01	0:40	13:01	8:16	20:37	7:16	19:37	10:16	22:37	11:16	23:37	9:46	22:07	11:01	23:22
26. feb.	10:46	23:12	9:46	22:12	10:01	22:27	0:22	12:46	1:22	13:46	9:01	21:27	8:01	20:27	11:01	23:27	—	12:01	10:31	22:57	11:46	—
27. feb.	11:40	—	10:40	23:10	10:55	23:25	1:12	13:40	2:12	14:40	9:55	22:25	8:55	21:25	11:55	—	0:27	12:55	11:25	23:55	0:12	12:40
28. feb.	0:10	12:46	11:46	—	—	12:01	2:10	14:46	3:10	15:46	11:01	23:38	10:01	22:38	0:25	13:01	1:25	14:01	—	12:31	1:10	13:46

sosialurin
www.sosialurin.fo